

kunnu stríða seg til javnstøðu á tingi innan fyri rímiliga tíð, kanska eitt ættarlið, meðan kvinnur í londum við ikki-lutfalsligum valskipanum ikki kunnu vænta munandi broytingar uttan stríð og strev í kanska hundrað ár afturat!

Og tað er júst tað vit síggja í Føroyum. Alt vanligt arbeiði at upplýsa, tosa, gera plakatir, kempa og skriva hevur mest havt smávegis framburð við sær, og heldur ikki tey óvanligaru tiltøkini, so sum kvinnulistar og aðrar snildir hava higartil muna eftir ætl, hóast tað týðiliga sæst, hvussu effektivur ein kvinnuflokkur kundi verið, í fyrsta umfari sum járnbrot, júst so sum føroyskar kvinnur í Keypmannahavn á sinni gjørdu fyri at sleppa upp í Føroyingafelag tann tíð tað var – í øðrum lagi at fingið staðfest tað, sum kvinnur høvdu raðfest, sluppu tær sjálvar at standa við róðrið.

Tann demokratiska skipanin í Føroyum virkar ikki nóg væl. Valskipanin hóskar ikki til okkara búsetingarmynstur, okkara smáu eindir og okkara patriarkalsku mentan, og hon er stutt sagt ein kleppur aftrat um beinini á okkum.

Um støðuna hesi seinastu árini kann sigast,

**at** í Norðurlondum er Svøríki tað landi, sum fyrst hevur rokkið málinum at fáa javnstøðu á tingi, men at Rwanda í 2003 við síni valskipan yvirhálaði Svøríki og nú er heimsins fremsta land á tí økinum,

**at** lutfalsligu londini longur suðuri í Evropa nú stríðast við at fáa kvinnuumboðanina tað avgerandi stigið upp á tey 36 prosentini, tær kalla Glastakið og helst uppum eisini, um tingkvinnur veruliga skulu vera hoyrdar og kunna seta sær sjónlig spor í tann førda politikkin,

**at** tey stóru londini við einmans valdømum framvegis liggja og stríðast við tøl sum líkjast okkara, Frakland og Bretland niðast, USA, Avstralia og Kanada nakað betri fyri,

**at** fátøk lond sum Bolivia, Mauritania, Palestina og fleiri afrikansk lond við kvotaskipanum eins og Rwanda hava fleirfaldað kvinnuumboðanina eftir stuttari tíð,

og **at** Grønland eftir tvey val við einum valdømi liggur beint í hølunum á Svøríki.

Lukkast tað ikki at gera Føroyar til eitt valdømi nú ella at broyta lógina, so uppstillingin kann taka sær av hesari naggatódnini, so er spurningurin um ikki orkan hjá teimum sum stríðast fyri javnstøðu á tí politiska pallinum var betri brúkt til ein Kvinnuflokk.

Hesa ferð hava vit Demokratia, sum stríðist fyri øktum kvinnuleikluti í politikki. Hugburðsbroyting skal til. Livst so spyrst.

3. mynd




4. mynd




| | N | F | S | D | Í | G | Á | F |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| > 3% | 1940 | 1900 | 1935 | 1918 | 1923 | 1959 | ? | 1978 |

5. mynd




| | N | F | S | D | Í | G | Á | F |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| > 5% | 1947 | 1945 | 1945 | 1960 | 1975 | 1960 | ? | 1980 |

6. mynd




7. mynd




8. mynd




9. mynd

